## Ten Cate klárur fyri Chelsea

Síðstu vikuna hevur mest sum verið greitt, at tað bert hevur verið ein spurningur um tíð, áðrenn Ajax-venjarin, Hen ten Cate, skifti til Chelsea, og nú er skiftið altso komið upp á pláss. 52-ára gamli Henk ten Cate skal tí vera hjálparvenjari hjá Avram Grant, sum tók við, eftir at portugisin, José Mourinho, hevði fingið sekkin eftir javnleikin ímóti Rosenborg í Champions League. Undan tíðini í Ajax var Henk ten Cate hjálparvenjari í Barcelona, meðan hann eisini hevur vant fleiri lið í Hollandi.



## Dómaraásetingar

**Atlantic Airways-kappingin:**

| | |
|---|---|
| Neistin – H71 | Sámal Paulason & Kári Hansen |
| VÍF – Kyndil | Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen |
| StÍF – KÍF | Hans Thomassen & Hanus Kúrberg |

**Sunset-kappingin:**

| | |
|---|---|
| Neistin – Stjørnan | Sámal Paulason & Kári Hansen |
| VÍF – Kyndil | Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen |

# Badmintonlandsliðið til Grønlands

**Mánadagin 15. oktober fer føroyska landsliðið í badminton til Grønlands at luttaka í Islands Badminton Event 2007, ið verður hildin í Grønlandi frá 15. til 23. oktober. Ferðalagið telur 13 fólk, t.e. vanjari, 8 íðkarar, Formaðurin í Badminton Sambandi Føroya og 3 hjálparfólk**

BADMINTON
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Islands Badminton Event 2007 er ein beinleiðis avleiðing av at badminton varð frávalt av listanum yvir ítróttargreinir á Oyggjaleikunum á Rhodos í summar. Tað er fyrr gjørt innan aðrar ítróttargreinar, at tað er skipað fyri tílíkum kappingum, í staðin fyri Oyggjaleikirnar, hetta kanska fyri at halda íðkarunum í gongd, og fyri at tileggja spælarunum at halda framm at íðka hesa ítrótt.

### Venjarin

Við í ferðalagnum verður sjálvsagt venjarin, hesin er danin Tobias Effersøe, ið hevur verið høvuðsvenjari hjá føroyska Badminton landsliðnum í hálvtannað ár.

Tá ein hoyrir navnið Effersøe, kemur einum til hugs at hetta kundi verið ein av føroyskum uppruna, og spurdur um hald var í hesum, og tað kundi hann bara vátta.

- Abbi mín varð føddur á Eiði og flutti til Tvøroyrar, áðrenn hann valdi at búsetast í Danmørk. Og dama mín sum arbeiðir á Argja Skúla verður í heilum heilsað av fólki, ið siga seg vera í familju við meg, sigur ein skemtandi landsliðsvenjari.

Tobias er annars sjálvur ein royndur badmintonleikari. Hann megnaði í sínum ungdómsárum at náa donskum landsliðsstøði, og seinni hevur hann valt at taka sær fleiri venjaraútbúgvingar, so at hann kundi halda áfram við at arbeiða við ítróttini, ið hevur givið honum so nógv.

### Lyklaleikarar

Í ár hava Føroyar eitt sera sterkt landslið, og harafturat hava vit eisini í minsta lagi 2 lyklaleikarar. Ein spælari sum Niklas Eysturoy man teljast millum teir heilt stóru.



*Stórtalentið, Niclas Eysturoy, sum er við í danska bruttohópinum til olympisku leikirnar í 2012, verður eisini við í ferðalagnum til Grønlands*



*Badmintonlandsliðið fer fyrst í komandi viku avstað til Grønlands, har liðið skal taka lut á Oyggjaleikum fyri badminton, nú badminton ikki var við á leikunum í summar. Spælararnir, sum eru við, eru, Aksel Poulsen, Brynhild Carlsson, Fjóla Luid, Flóvin Mikkelsin, Guðrið Poulsen, Niclas Eysturoy, Rógvi Poulsen og Sigrun Smith*

Niklas venur sjálvandi upp til kappingina í Grønlandi, umframt at hann eisini er við í einum bruttohópi, ið venur til at koma til Olympisku leikirnir í 2012. Hesar venjingar eru í Bulgaria, og er Niklas farin hagar í morgun. Haðani skal hann so beinleiðis til Grønlands og í kapping har.

Eisini hava vit eitt ungt stjørnuskot úr Danmørk, ið er rímuliga ókend í Føroyum. Hon er hálvur føroyingur, býr í Middelfart, er 18 ár og eitur Sigrun Smith.

Sigrun var fyri á leið einum ári síðani í Føroyum, og vandi hon í badmintonhøllini tá. Har var tað at lagt var til merkis, hvussu evnarík hendan unga gentan var, og tað varð alt fyri eitt eftirkannað, um hvør hon var og hvaðani hon kom.

Fyri viku síðani luttók Sigrun í Danish Junior Cup 2007, sum er stór kapping á flatlondum.

### Vónir

Tá venjarin varð spurdur um vónirnar til kappingina fyri framman, tóktist hann at vera varin, og vildi ikki loyva sær at vera ov bjartskygdur, tí sum hann segði, so veit hann ikki so nógv um hini londini.

- Eg kenni nøkur nøvn aftur á hinum landsliðunum, men dagsins styrki hjá teimum og annars hinum ókendu, hana kenni eg ikki nógv til.

Tobias kann tó vátta, at liðið er betur enn nakrantíð áður, og lagið er gott í hópinum.

- Spælararnir eru sera spentir um uppgávuna ið liggur fyri framman, og vóna og vænta sær okkurt heiðursmerki heim við aftur.

### Stutt skoðbrá

-Tann sannroynd, at tveir av okkara lyklaleikarum eru í stórum kappingum, so stutt áðrenn Badminton Event í Grønlandi, er ørkymlandi, sigur Vilhjálmur Gregoriussen, formaðurin í Badminton Sambandi Føroya. Tað er tó eisini ein kjansur fyri at júst hesir báðir leikararnir eru eyka klárir tá kappingin fer av bakkastokki mikudagin.

- Tað kann vera at tey eru vorðin útkoyrd av hørðu skránni, men tað kann eins væl vísa seg at tað hevur givið teimum eyka orku, sigur formaðurin at enda.

## Toppdysturin verður á Hálsi

**Toppdysturin í Atlantic Airways-kappingini verður á Hálsi, har tey bæði ósigraðu liðini, Neistin og H71 møtast**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tríggir dystur í Atlantic Airways-kappingini hjá monnum vera um vikuskiftið. Í høllini á Hálsi verður toppdystur á skránni, tá Neistin og H71 møtast. Bæði Neistin og H71 hava fult stigatalv í kappingini, og tí leggur vinnandi liðið seg einsamalt á odda eftir vikuskiftið.

Tann dysturin, sum mest spenningur man vera um, er tó dysturin í Vestmanna, har tann sokallaði klassikarin verður á skránni. Her tekur VÍF ímóti Kyndli, men undan dystinum liggur hvørki teirra í oddinum. VÍF fekk sín fyrsta sigur síðsta vikuskiftið og liggur á fjórða plássi, meðan Kyndil slett einki stig hevur fingið enn. Teir hava tapt báðar sínar dystir við 10 málum ella fleiri.

Síðsti dysturin verður í høllini á Skála, har StÍF tekur ímóti KÍF. Um vit hyggja at stigatalvuni, so er StÍF helst lítil favorittur undan dystinum. Teir vunnu fyrsta dystin ímóti Kyndli fyri síðani at tapa ímóti H71. Hjá kollfirðingum sær ikki so gott út. Teir hava einki stig fingið eftir tap ímóti H71 og VÍF, og tí skulu teir helst vinna dystin á Skála sunnudagin.